

# Amerika svimur í fiti

**Chips hevur vunnið á eplum. Grillbarir á heimagjørdum matpakkum og annan hvønn tíma opnar ein nýggj fast-food matstova við feitum tilboðum. Her eru nøkur tøl, ið siga eitt sindur um altumfevnandi fast-food ídnaðin í Norðuramerika**



ÁT
*Niclas Johannesen*

Nú hava amerikanarar hava sjálvir funnið útav, at tað allarhelst er eitt samband millum risavøksturin í junk-matstovum og yvirflóðina á kalorium, ið beinleiðis hótta heilsustandin hjá milliónum av borgarum í burgaraheimlandinum.

### Meira enn ráðiligt

Hóast heimsmet í sjónvarpsrásum at velja ímillum, so vísir kanning, at almenni kunnleikin er so ússaligur, at fá vita, at ein Double Whopper við osti frá burgaraketuni Burger King inniheldur 960 kaloriur og 63 gram av feitti - hetta er umleið tilráddi dagstørvurin hjá eini kvinnu.

Og tey, sum leita sær yvirum vegin til eina kina-grill í trúnni, at her er eitt sindur sunnari at vera, ja tey fara púra skeiv. Ein talerkur við grísakjøti, sum svimur í eitt sindur av súrsøtari sós í eini typiskari kina-grillbar inniheldur umleið 1,610 kaloriur og okkurt um 70 gram av fita - meira enn nóg mikið til forbrenning í ein heilan dag.

Ein stór kanning, gjørd í Kanada, staðfestir, at tað er ikki samanhangur millum tað, fólk siga og tað, tey gera, tá tað snýr seg um matvanar. 55 prosent av teimum spurdu siga, at tey á ein virknan hátt royna at eta minni feitan mat og 54 prosent siga, at tey royna at halda seg frá feitt-stoktum mati. Men serfrøðingar siga, at her lekur álvarsliga millum teori og praksis. Fólk rætt og slætt pella fyri sær sjálvum.

### Bilmáltíð

Vesturheimsins borgarar hava skund. Maturin skal niðurum - ongantíð ov skjótt. Og tað er júst hesum, sum mongu matstovuketurnar hava funnið útav. Størsta uppgávan er at kunna levera matin skjótast gjørligt.

Saman við nýuppfunna tørvinum at snakka í telefon meðan tú koyrir, er talið á 'drive-through' matstøðum eksploderað. 17 prosent av øllum rættum verður nú serveraður gjøgnum bilvindeygað. Hetta er eitt rák sum er í miklum vøkstri.

Hvønn morgun opna 28.000 McDonalds dyrnar kring allan heim og 2000 nýggjar deildir leggjast aftrat á hvørjum ári. Leggur tú stórar ketur sum Burger King, McDonalds, Taco Bell, Pizza Hut og KFC saman, so letur ein nýggj deild upp annanhvønn tíma - alt samdøgrið.

### 'Teenie Beanie Baby'

Eru tey mong, sum royna at liva sunt, so eru tey uppaftur fleiri, sum ikki gera tað. Fyri fimm árum síðani fór 60 prosent av tí, sum brúkt var at eta úti fyri til lutfalsliga bíligan grillmat. Í dag er hetta talið vaksið upp í 64 prosent. Bara í Kanada eru 26.000 fast-food matstovur.

Og stóru fyritøkurnar koyra knallhart eftir serliga teimum ungu etarunum. Tey skulu alast upp til skjótan mat. Eitt 'Teenie Beanie Baby' gávuframtak hjá McDonalds í 1997 økti um søluna av sokallaðu 'Happy Meals' úr tíggju milliónum um vikuna upp í 100 milliónir.

Smakkar maturin væl, so er tað neyvan tí, at kúgvin hevur gingið á góðum lendi.

Smakk-verksmiðjur kunnu við kemiskum snildum nágreiniliga eftirapa at kalla øllum matsmakki við ymsum loyniligum formlum, og hetta verður nýtt í stríðum streymum innan fast-food ídnaðin.

Eric Schlosser, høvundin aftan fyri nógv seldu bókina Fast Food Nation, The Dark Side of the All-American Meal, fekk atgongd til eina slíka verksmiðju: "Í serliga einum føri var eg tikin av bóli. Knappliga, eftir at eg hevði latið míni eygu aftur, stóð sterki roykurin av einum grillaðum burgara í nasarnar á mær. Tað luktaði, sum um onkur í rúminum vendi einum burgara á eini heitari grill. Tá eg opnaði eyguni var kortini tað einasta eg sá ein lítil hvít strípa á hvítum papíri og eitt smílandi starvsfólk."

## VISTI TÚ

Í 1960 át vanligi amerikanarin 81 pund av frískum eplum og fýra pund av steiktum chipsi um ári. Í dag er lutfallið 49 pund av frískum eplum og 39 pund av chipsi.

Ein kunstiga smakkandi jarðberja milkshake inniheldur 45 kemikalu.

Chips eru frísk og brún, tí tey er sproytaði við einum løttum drússi av sukuri.

*Kelda; The Vancouver Sun*



Elsta livandi løgmansfrúan:

# Eg sigi nei takk til landsstýrispensjón



*– Skulu vit byggja eitt land upp soleiðis, gerast vit aldri eitt sjálvstøðugt land. Hetta tekur botnin undan øllum sjálvstýrishugsjónum. Vit kunnu ikki bara tveita pengarnar soleiðis frá okkum í staðin fyri at brúka teir til tað, sum mest tørvur er á í samfelagnum, sigur elsta løgmanseinkjan um nýggju landsstýrispensjónina, sum hon fær góðan bita av*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Nýggja eftirlønin til landsstýrismenn hevur við sær, at 91 ára gamla Hjørdis Djurhuus í næstum fer at fáa knappar 20 túsund krónur í pensjón um mánaðin. Orsøkin er, at maður hennara, Hákun Djurhuus, sáli, var løgmaður. Men Hjørdis heldur pensjónina vera heilt burturvið, eins og hon máar støðið undan fullveldinum**

LANDSSTÝRISPENSJÓN
*John Johannessen*

– Eg ætli mær so avgjørt ikki at taka ímóti hasum 20 túsund krónunum.

Hetta var fyrsti tankin hjá teirri 91 ára gomlu einkjuni eftir Hákun Djurhuus, fyrrverandi løgmann, tá hon fekk at vita, at løgtingið hevur samtykt nýggja stóra pensjónsskipan til allar landsstýrismenn aftur til 1951 og allar einkjur eftir teir landsstýrismenninar, sum eru deyðir.

Hjørdis Djurhuus heldur tað vera heilt burturvið, at hon nú brádliga skal fáa eina stóra pensjón, bert tí maður hennara hevur verið løgmaður.

Hákun Djurhuus, sáli, var løgmaður frá 1962 til 1966, landsstýrismaður frá 1951 til 1957 og harumframt tingmaður frá 1946 til 1980. Hetta gevur honum rætt til fulla eftirløn eftir nýggju skipanini fyri løgmenn og landsstýrismenn, sum er umleið 26 túsund krónur um mánaðin. Men av tí, at Hákun Djurhuus er deyður, fella 75 prosent av pensjónini til einkjuna. Tað vil siga, at 91 ára gamla Hjørdis Djurhuus frá 1. januar fer at fáa knappar 20 túsund krónur um mánaðin settar inn á konto sína.

### Geva til tey veiku

– Handan pensjónsskipanin er ein ógvuliga illa umhugsað avgerð. Tað ber ikki til, at politikararnir bara brúka so nógvan pening til pensjónir til sín sjálvs, meðan tey veiku í samfelagnum einki fáa, sigur Hjørdis Djurhuus avgjørd.

– Sum eg segði, hugsaði eg beinan vegin, at eg fór at senda pengarnar aftur, hagar teir koma frá. Men seinni havi eg hugsað at senda teir víðari til vælgerandi endamál. Tað eru so nógv, ið hava brúk fyri hjálp, sigur Hjørdis Djurhuus.

Løgmanseinkjan ger púra greitt, at fer hon at taka ímóti landsstýrismannapensjónini, fer hon ikki at brúka hana til sín sjálvs. Og hon roknar heldur ikki við, at arvingarnir vænta sær pengarnar, tí teir klára seg.

### Forðar fyri fullveldi

Maður Hjørdis Djurhuus arbeiddi sum løgtingsmaður í samfull 34 ár, umframt at hann var landsstýrismaður og løgmaður. Tí spyrja vit Hjørdis Djurhuus, um hon ikki kortini heldur tað vera rætt, at politikarar eisini í aldurdóminum fáa løn fyri sítt stríð.

– Skulu vit byggja eitt land upp soleiðis, gerast vit aldri eitt sjálvstøðugt land. Hetta tekur botnin undan øllum sjálvstýrishugsjónum. Vit kunnu ikki bara tveita pengarnar soleiðis frá okkum í staðin fyri at brúka teir til tað, sum mest tørvur er á í samfelagnum.

– Her hugsi eg aftur um, at vit skulu brúka pengarnar til tey gomlu og brekaðu, áðrenn vit hugsa um undirsjóvartunlar og líknandi, ger Hjørdis Djurhuus greitt.

### Ov stórur munur

Men heldur Hjørdis Djurhuus kortini ikki, at politikarar eiga rætt til eftirløn fyri sítt stríð fyri landið?

– Ja, tað er eingin í samfelagnum – høgur ella lágur – sum ikki hevur uppiborið sína løn. Men munurin skal ikki vera so stórur. Hvat um tey, sum fáa minst løn hvørva úr einum samfelag, hvussu sær samfelagið tá út? Hvat við teimum smáu lønunum til tey, sum eru so virðismikil í samfelagnum, spyr løgmanseinkjan.

Hjørdis Djurhuus unnar politikarum eftirløn, men hon heldur tað kortini vera heilt burturvið, at politikarar skulu fáa ovurstóra eftirløn, meðan onnur einki fáa.

– So stríggi er arbeiðið hjá teimum heldur ikki. Hákun gjørdi sítt arbeiði, tí honum dámdi tað, sigur Hjørdis Djurhuus, einkjan eftir løgmannin, Hákun Djurhuus.

